# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Eyðun Andreassen 60 ár

Sunnudagin 27. februar 2005 fyllir Eyðun Andreassen professari í Havn 60 ár. Eyðun er ein fjølbroyttur maður við fjøltáttaðum gávum. Han hevur við góðum hegni tikist við mangt og hvat, og gjøgnum alt hevur ein týðandi felagsnevnarin verið samskifti.



Eyðun er føddur í Skúvoy, har hann búði sum smádrongur. Síðan miðskeiðis í 50-unum hevur hann búð í Havn.

Foreldrini, Elisabeth, f. Kamban, úr Havn, og Petur Andreasen, ættaður av Velbastað, vóru bæði lærarafólk.

Eyðun tók nýmálsligt studentsprógv í Hoydølum í 1964 og hægri handilsskúlaprógv í 1966. Hann tók prógv sum cand.mag. í fólkaminnisfrøði, etnologi og søgu í 1974, og mag. art. í fólkaminnisfrøði í 1976 á universitetinum í Oslo. Í 1992 bleiv hann dr. pihl. við universitetið í Keypmannahavn við ritgerðini Folkelig offentlighed.

Hann hevur m.a. arbeitt sum lærari í fólkaskúlanum, í Útvarpi Føroya og á myndablaðnum Magn. Hann hevur verið adjuntur við universitetið í Keypmannahavn, og stipendiatur hjá Statens Samfundsvidenskablige Forskningsråd í Keypmannahavn.

Í 80-unum var hann skjalavørður á Landsskjalasavninum, og frá 1988 til 1994 var hann lektari á Fróðskaparsetri Føroya og síðan 1994 hevur hann verið professari á Fróðskaparsetrinum.

Eyðun var limir í nevndini, ið gjørdi núverandi kringvarpslógina.

Eyðun hevur verið næstformaður og formaður í Fróðskaparfelag Føroya, og nevndarlimur í Dansk-Færøsk kulturfond í 12 ár.

Hann er limur í Nordisk Forskningspolitisk Raad og formaður í Granskingarráðnum síðan 1999. Nú er hann stýrislimur í nýggja norðurlendska granskingarráðnum Nordforsk.

Eyðun verður tíðum boðin uttanlands at halda fyrilestur, og var nú í januar í Oslo, har hann var boðin at halda fyrilestur á ráðstevnuni Norge i Verden, ið Universitetið í Oslo helt í sambandi við 100 ára dagin síðan Noreg gjørdist sjálvstøðugt kongaríki aftur.

Hann hevur givið út bøkur sum t.d. Fjernsyn på Færøerne, Úr søgu og søgn, og Kvæðabókina hjá Tróndi á Trøð. Hann hevur eisini skrivað nógvar greinar um ymisk mentanarlig evni í bløðum og tíðarritum og týtt fleiri útvarpsleikir og onkran sjónleik.

Eyðun er giftur Astri Luihn, listakvinnu, sum er norsk, og tey eiga 20 ára gomlu dóttrina, Mariu.

## Henning Mortensen 75 ár

1. mars verður Henning Mortensen á Argjum 75 ár. Henning er føddur og uppvaksin í Fámjin. Foreldur hansara vóru Elsa og Tummas í Kálvustovu. Tey fingu átta børn, og av teimum var Henning yngstur.



Henning fór ikki sum aðrir ungir dreingir til skips, men í staðin valdi hann sær annað lívsstarv. Henning flutti sum seytjan ára gamal av bygdini og fór 10. jan. í 1948 í læru sum skipstimburmaður á Tórshavnar Skipasmiðju. Á skipasmiðjuni varð hann verandi í 51 ár, áðrenn hann legði frá sær. Men torført man vera at sleppa lívsstarvinum, um heilsan er góð, og enn gongur leiðin heim á skipasmiðjuna eina ferð um vikuna, hetta er tó mest til sosialt hugnaprát.

Henning fekk sær konu úr Sandvík, Sanna dóttir Sigrid og Niclas Joensen, sum búðu Uttan Ánna í Sandvík til tey fluttu á Argir. Henning og Sanna bygdu sær hús úti á Argjum. Tey eiga fimm børn, fýra døtur og ein son, síðani eru komin 21 abbaommubørn og trý langabba-ommubørn.

Henning hevur altíð verið fittur í hondunum. Nógv hevur hann evnað til, og skjótur er hann at hjálpa til um á stendur. Hóast aldurin er høgur, hevur Henning enn hug og vilja at arbeiða. Honum dámar best at putlast vit eitt hvørt, fyri einki dugir hann illa at sita.

Henning hevur verið og er virkin í Kirkju og Missiónshúsinum á Argjum. Hann var í síni tíð við til at byggja húsið. Í kirkjuráðnum sat hann eisini í mong ár.

Henning og Sanna bera stóran alsk til Suðuroynna og hava seinastu nógvu árini trúliga vitjað suður á hvørjum summari. Hús hava tey í Fámjin og har er altíð okkurt at takast við. Náttúran er beint við, og ein túr niðan á Kirkjuvatn ella longur upp á fjøllini ein góðan dag hevur verið fastur táttur. Í ár ætla tey sær tó at síggja blómugarðin á Argjum í summarbúna og fara seinni í ár suður at njóta nakrar vikur í Fámjin.

Við hesum verður ynskt Henningi hjartaliga tillukku við degnum.

**bb**



Fyri 30 árum síðan:

## Tólv sjúkrasystrar tóku prógv í 1975

**Í mars 1975 tóku 12 sjúkrasystrar prógv á Sjúkrasystraskúla Føroya**

*Aftara rað f.v.:* Ann Hovland, Svínoy, Cecilia Eliasen, Klaksvík, Jórun Weihe, Mikladalur, Sólvá Patursson, lærarinna, Poula Poulsen, lærarinna, Bergiot Ihlen, lærarinna, Kirsten Petersen, Porkeri, og Bergfríð E. Nielsen, Klaksvík.

*Fremra rað f.v.:* Mirjam Carlsen, Tórshavn, Tove Thomsen, Klaksvík, Ása Patursson, Kirkjubøur, Tordur Niclasen, Sørvágur, Svenhild Haraldsen, Strendur, Anna Absalonsen, Klaksvík og Sigrun Lützen, Tórshavn

Tordur Niclasen úr Sørvági var fyrsta mannfólkið, sum tók prógv á Sjúkrasystraskúla Føroya.